


## Hava hug at keypa Saab

Fleiri íleggjarar hava hug at seta pengar í svensku bilverksmiðjuna Saab. Herfyri gjørdi amerikanska General Motors av at selja Saab, og nú sigur leiðslan í svenska felagnum, at meiri enn 20 íleggjarar hava víst fyritøkuni áhuga. General Motors hevur sagt, at Saab skal endurreisast ella seljast endaliga í seinasta lagi í juni, og sambært Guy Lofalk, sum stendur fyri arbeiðinum, verður fyritøkan helst seld innan ta tíð, skrivar TT. Saab skyldar fleiri veitarum og umboðum pengar, men søluætlanin sigur, at tveir triðingar av skuldini skulu fella burtur.

## Ecco koyrir 1150 til hús

Skógvaverksmiðjan Ecco, sum hevur høvuðsstøð í Bredebro í Suðurjyllandi, kennir av álvara sviðan av altjóða fíggjarkreppuni. Eftir ein lutfalsliga gott ár í fjør við meiri enn einari hálvari milliard krónum í avlopi er gongdin vend, tí at skósølan er minkað nógv higartil í ár. Sum eina avleiðing av tí kunngjørdi Ecco í gjár, at fyritøkan noyðist at siga 1.150 starvsfólkum upp. Talan er kortini ikki um uppsagnir í Danmark, men á fýra verksmiðjudeildum, sum Ecco hevur í Asia og í Slovakia. Ecco hevur næstan 15.000 fólk í arbeiði. Av teimum arbeiða 565 í Danmark.

# Tonito mettar marknaðin

**Brævbjálvafyritøkan Tonito á Eiði hevur nú meira enn tjúgu ár á baki, og hóast tað kann ljóða undarligt, var tað kreppan fyrst í 90-árunum, sum fekk føroyingar at hugsa føroyskt. Og tað setti ferð á virkið og framleiðsluna**

VINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Niels Emil Andreasen eigur Tonito saman við bróðrinum, Torleifi og sváginum, Tordi Niclasen. Tveir teir fyrstu bókstavirnir í teimum trimum nøvnunum leggja grund til navnið á fyritøkuni*

Í 1988 gingu nakrir eiðismenn og hugsaðu um, hvat teir skuldu finna upp á at gera. Tá vóru tíðirnar soleiðis, at alt bar til, tað einasta tú skuldi mta upp við í peningastovninum, var eitt hugskoti, og so plagdi lán ikki at vera nakar trupulleiki.

- Vit hugsaðu um, hvat vit skuldu fara undir. Tað mátti sjálvandi vera okkurt, sum vit øll brúktu nógv av, og so gjørdist tað til brævbjálvar, sigur Niels Emil Andreasen, stjóri á Tonito.

Tá hann sigur vit, sipar hann til svágin, Tordur Niclasen, og beiggjan, Torleif Andreasen. Harav navnið Tonito.

- Hetta hevur altíð verið ein familjufyritøka, sigur Niels Emil Andreasen.

Tað fanst framman undan eingin slík fyritøka í Føroyum, og allir brævbjálvar, sum føroyingar tá nýttu, vórðu innfluttir.

- Tað var heldur stríggið at koma inn á marknaðin tá. Tíðirnar vóru góðar, og eingin hugsaði so nógv um, hvussu pengarnir vórðu nýttir, sigur Niels Emil Andreasen.

Virkið arbeiddi seg spakuliga inn á marknaðin, og í dag meta tey seg hava áleið 80% av allari sølu á føroyska marknaðinum.

Frá góðu tíðunum í 80-unum fram til dagin í dag, við serligum atliti til kreppuna fyrst í 90-árunum, hava føroyingar á sín vís broytt hugburð, tá tað kemur til at keypa føroyskt.

- Jú, eg haldi at hugburðurin er broyttur. Vit høvdu kreppuna í 90-unum, og tá haldi eg, at fólk fóru at hugsa øðrvísi og løgdu størri dent á, hvat tey brúktu pengarnar til. Og eg vil næstan siga, at tað var lættari at koma inn á marknaðin tá, sigur Niels Emil Andreasen.

Síðani tá hevur gingið framá alla tíðina, og fólk keypa nú føroyskt, um vøran annars er kappingarfør. Og tað er hon, bæði í góðsku og í prísi.

### Støðug framleiðsla

Nógv mest nýtta støddin, sum verður nýtt í dag, er A5, sum handilsligar og vinnuligar fyritøkur nýta til tað tilfar, sum tey senda út til síni viðskiftafólk. Men Tonito framleiðir kortini fleiri aðrar støddir.

Nýggju tíðirnar hava merkt framleiðsluna hjá Tonito, serliga tá hugsað verður um nýggju elektronisku miðlarnar.

- Jú, tað hava vit merkt í ein mun. Postverkið sigur, at talan er um eina afturgongd í postinum, og tað síggja vit eisini á ávísum økjum. Hinvegin, so eru vit vaksin alla tíðina, men tað kemst av, at vit hava fingið fleiri kundar, sigur Niels Emil Andreasen.

Sjálv nýtslan er stagnerað og kanska fyri afturgongd, men tað koma nýggjar funktiónir inn alla tíðina.

- Tað varð jú sagt, at tá teldan veruliga kom inn á marknaðin, skuldi einki pappír brúkast, men eg haldi, at tað ongantíð hevur verið brúkt so nógv pappír sum nú, sigur Niels Emil Andreasen.

Og – kanska sum eitt sindur av lagnunnar speisemi – er ein av nýggju vørunum internetrokningar.

- Tá internetið kom varð jú roknað við, at tað fór at spara hópin av pappíri, men í staðin fingu vit meiri at gera, sigur Niels Emil Andreasen.

Soleiðis tykjast nýggir møguleikar koma undan kavi, tá aðrir hvørva.

### Tillaga seg tíðirnar

Mesta av rávøruni verður innflutt í stórum pappírsrullum, sum so verða settar fyri annan endan av maskinuni, fyri síðani at koma út í hinum endanum sum liðugt framleidd vøra.

Og stóra søluvøran hjá virkinum er sum nevnt A5-støddin, og tað hevur eisini sína náttúrligu frágreiðing.

- Tað eru serliga peningastovnarnir, sum eru stórir kundar, men aðrir stovnar og fyritøkur nýta nógv av hesari støddini av brævbjálvum, sigur Niels Emil Andreasen.

Sum nevnt framleiðir Tonito fleiri støddir av brævbjálvum, men tað er kortini ikki einasta framleiðslan hjá fyritøkuni.

- Umframt brævbjálvarnar hava vit eisini ymiskar prentmaskinur, og framleiða eitt nú brævpappír og visitkort eisini, sigur Niels Emil Andreasen.

Framleiðslan er sjálvandi eftir tørvi, og higartil hevur Tonito ikki merkt nakað til, at tíðirnar eru verri í Føroyum.

- Men eg trúgvi, at tað kemur, tí alt virksemi verður minkað. Øll skrúva niður fyri blussinum, so eg rokni við, at tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn tað í ein ávísan mun fer at raka okkum eisini, sigur Niels Emil Andreasen.

Hann sigur, at fyritøkan ikki í løtuni hevur nakrar ítøkiligar ætlanir um at víðka um virkisøkið, skuldi tað hent seg, at verandi virkisøki verður hart rakt.

- Vit hava altíð ávísar ætlanir, men tíðirnar eru ikki tær bestu í løtuni at byrja upp á nakað nýtt, sigur Niels Emil Andreasen.

Hann heldur tí frægastu loysnina verða, at laga seg til tíðirnar, skuldu tær broytst.

- Øll okkara framleiðsla verður seld á heimamarknaðinum, og tað verður neyvan møguligt at fara undir nakran útflutning av okkara vørum. Vit hava kannað hetta í ein ávísan mun, og tað tykist ikki vera ein møguleiki, sigur Niels Emil Andreasen.

Skuldi tað komið upp á tal, skal rávøran fyrst flytast til Føroya, framleiðast til brævbjálvar, og síðani flytast út aftur, og tað er ikki lønsamt.

Tað starvast millum fýra og seks fólk á virkinum, alt eftir tørvi.

